# Scania órógvar kaiøkið

**Ferðslunevndin hjá Klaksvíkar kommunu tók í gjár stig til at bøta um ferðsluviðurskiftini á vestara kaiøki, har støðan hevur verið kaotisk, síðani Scania fór at sigla**

FERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Síðani Scania loysti Dúgvuna í siglingini millum Klaksvik og meginøkið, hevur rumbul verið í ferðsluni á vestara kaiøki í Klaksvík.

Vanliga siglir Dúgvan av Stongunum í Klaksvík, sum er á eystara armi, og har er partur av havnalagnum ætlaður til júst hetta endamál. Scania er ov stór at leggja at við hesa ferjulegu, og tí brúkar hon eitt pláss á vestara kaiøki, sum tó alt er eitt stórt arbeiðspláss við nógvum virksemi.

Bilrøðirnar til Scania vóru fyrst lagdar út eftir kaiini, men hetta órógvaði arbeiðsumstøðurnar á økinum so nógv í gjár og fyrradagin, at ferðslunevndin hjá Klaksvíkar kommunu í gjár broytti hetta. Nú skulu bilarnir bíða í røð heim eftir kaini, og tað heldur ferðslunevndin fer at bøta um støðuna.

Tað er meira pláss heimeftir kaiini, og har er ikki so ógvusligt virksemi sum longur úti á økinum, har bilarøðirnar vanliga verða lagdar, tá siglt verður av vestaru síðu.

### Einvegis ferðsla

Samstundis hevur ferðslunevndin gjørt av, at ferðslan á kaiøkinum skal verða einvegis úti eftir kaiini. Skeltið eru sett upp, so tað nú bert er loyvt at koyra oman á kainina við Blikksmiðjuna, og tað er bert loyvt at fara koyra niðan aftur við Snørisvirkið. Her kemur eisini eitt spegl upp, so bilar fáa betri útsýnið úteftir.

- Kaiøkið er eitt stórt arbeiðspláss, og har er sera nógv virksemi. Tí fer øll ferðsla á økinum at órógva arbeiðsumstøðurnar, men vit vóna, at hetta fer at bøta nakað um støðuna, sigur Karl Heri Joensen, formaður í ferðslunevndini hjá Klaksvíkar kommunu.

– Tað hava leingi verið trupulleikar við óneyðugari ferðslu á kaiøkinum, og møguliga verða onkur meira varðandi stig eisini tikin fyri at gera arbeiðsumstøðurnar betur, og kanska fara hesi fyrstu stigini fara at minna fólk á, at kaiin er eitt arbeiðsøki og ikki er ætlað óneyðugari koyring, sigur hann.



*Siglingin hjá Scania av vestara kaiøki í Klaksvík hevur órógvað arbeiðsumstøðurnar á økinum*

# Eldraíbúðir reistar

**Hósdagin varð móttøka hildin í Klaksvík í sambandi við at tveir av teimum trimum bygningunum, sum skalu nýtast til eldra íbúðir, vórðu reistir og innilokaðir**

ELDRARØKT
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Heilt fitt av fólki var komið saman til móttøkuna, tá Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri bjóðaði vælkomin og segði nøkur orð um bæði sambýlið og íbúðirnar.

Eisini Jákup Pauli Johannesen frá Fuglø Arkitektar tekniskur ráðgevi, av verkætlanini undir Kráarbrekku helt røðu. Hann tosaði millum annað um, at tað er umráðandi hjá eldru fólkum, sum kanska ikki eru so væl gongd, at hava gott útsýni. Tí ein kann ferðast víða í huganum, tá ein hevur gott útsýni. Og tað fáa íbúðarfólkini. Tey síggja út yvir allan býin.

Í verkætlanini undir Kráabrekku eru tríggir bygningar til íbúðir og eitt sambýlið. Seks av íbúðunum eru sjeyti fermetrar til støddar og restin eru so fimti fermetrar. Sambýlið kann hýsa 16 fólkum, sum fáa egið kamar við WC og bað og gongd.

Íbúðirnar eru ætlaðar til eldri, sum eru væl fyri, meðan sambýlið er til eldri, sum kanska ikki orka so væl at taka sær av eini íbúð.

- Har er eitt kamar helst akkurát gott, sigur Steinbjørn Jacobsen.

- Sambýlið verður væntandi liðugt í summar og íbúðirnar til jóla, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.



# Gomul vilja úr heiminum

**- Tað er ótrúligt, sum áhugin fyri íbúðunum og sambýlinum er stórur, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík. Vit hava fingið umleið seksti umsóknir. Og nú síðani vit hava tosað um verkætlanina í fjølmiðlunum, hevur áhugi eisini víst seg aðrastaðni frá í landinum**

ELDRARØKT
*Solby A. Eliasen*



Borgarstjórin í Klaksvík sigur, at fleiri av umsøkjarunum eru fólk, sum eiga stór hús, sum tey vilja selja fyri síðani at flyta inn í eina av íbúðunum undir Kráarbrekku.

- Tað hevur so samstundis við sær, at fleiri hús í Klaksvík verða til sølu eftir at fólk eru byrjað at flyta inn undir Kráarbrekku, sum so ger, at tær ungu familjurnar í kommununi lættari kunnu útvega sær eini hús. So vit kunnu fáa tvær flugur við eitt smekk har, sigur Steinbjørn, sum tó vísir á, at tað so avgjørt ikki er nøkur treyt at eiga hús fyri at kunna fáa íbúð undir Kráarbrekku.

Íbúðarfólkið skal rinda húsaleigu umframt eitt tilskot. Tey skulu ikki hugsa um viðlíkahald av nøkrum slag. Í millum bygningarnar verða skúrar til hvørja einstaka íbúð til at goyma ymiskt í. Tað kann vera súkklur ella okkurt annað. Steinbjørn sigur, at jarðarmunurin á stykkjunum ger tað so einkult at koma inn, bæði í íbúðirnar í erva og neðra. Man kann koma beint inn.

Eisini er ætlanin at ein hjallur skal verða uttan fyri úthurðina.



# Club 20 krevur endurgjald

**Eigararnir í Discoteque Club 20 ivast ikki í at krevja endurgjald frá ákæru-valdinum, eftir løgreglan av órøttum gjørdi av at steingja diskotekið eina sunnunátt fyri einum ári síðani. Fútin hevur ásannað mistakið, men vil ikki gera tað skrivligt sambært eigarunum**

ENDURGJALD
*Stefan í Skorini*

Løgreglan gjørdi eitt mistak, tá hon tveitti allar gestirnar úr Club 20 leygarkvøldið millum langafríggjadag og 1. páskadag í fjør. Klokkan var farin av midnátt, og av tí at tað nú var 1. páskadagur, metti løgreglan, at halgidagslógin varð brotin.

– Vit hava munnliga fingið at vita frá fútanum, at einki meira verður gjørt við hetta málið, eftir at vit hava verið skuldsettir í eitt ár, sigur Petur Olsen, eigari av Club 20.


*Club 20 misti umsetningin í barrini eitt leygarkvøld í fjør, tá løgreglan stongdi diskotekið. Eigararnir krevja nú endurgjald*

*Mynd: www.club20.fo*

Eigararnir halda tó, at tað er løgið, at fútin ikki vil geva teimum hesi boðini skrivligt. Teir hava heitt á fútan um at geva teimum boðini skrivliga, men hesum sýtir hann fyri sambært eigarunum.

Toni Dam og Petur Olsen, sum eiga partafelagið, ið eigur og rekur Club 20, ivast ikki í at krevja endurgjald frá fútanum fyri mista inntøku.

– Vit máttu lata gestunum peningin fyri atgongumerki aftur, og vit skuldu framvegis gjalda lønir til starvsfólkið, og vit mistu umsetningin í barrini eitt heilt leygarkvøld, siga teir báðir.

Tí fara teir nú at krevja endurgjald, eftir at løgreglan tveitti gestirnar út, og nú seinni vísir tað seg, at løgreglan ikki fór rætt fram.

### Fyrireika stevning

Jógvan Páll Lassen er sakførari hjá Club 20, og hann fyrireikar í løtuni eina stevning móti ákæruvaldinum.

– Vit hava latið ein grannskoðara kannað tølini og gjørt nakrar útrokningar, og tá tað fyrireikandi arbeiðið er liðugt stevna vit fútanum eftir endurgjaldi, sigur Jógvan Páll Lassen.

Jógvan Páll heldur, at tá fútin gevur eigarunum munnlig boð um, at einki meira verður gjørt við málið, ásannar hann samstundis, at løgreglan gjørdi eitt mistak, tá hon ruddaði Club 20.

Sosialurin royndi at fáa viðmerking frá vara fútanum Finn Ougaard fríggjamorgunin, men hann var í Landsrættinum, varð sagt á fútaskrivstovuni.

# Hassj funnið á Vónini

HASSJ
*Stefan í Skorini*

Arbeiðsmenn á Trolverkstaðnum Vónini í Álakeri í Havn fingu ein lítlan hvøkk, tá teir hósdagin funnu 160 gramm av hassji á einum platti, sum var komin við farmaskipi úr Hirtshals. Løgreglan varð boðsend beinanvegin, og hon legði hald á hassjið.

Nøgdin var 160 gramm, og hetta hevur eitt virði á einar 20.000 krónur á gøtuni, um søluvirðið verður sett at vera 125 krónur fyri grammið.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini sigur, at platturin kom úr Danmark mánadagin í seinastu viku, men hassjið var ikki funnið fyrr enn hósdagin í hesi vikuni, tá menn fóru at taka tilfar av plattinum.

Løgreglan hevur ongar ábendingar um, hvør stendur fyri hesi smuglingini, og eingi spor eru at ganga eftir enn.

# Spæla hasard við tipspengunum

**Heðin Mortensen, formaður fyri ÍSF, metir, at landsstýrið spælir hasard við tipspengunum við bíða við at góðkenna sáttmálan. Hann sigur seg hava merkt trýst úr Danmark, og hann ivast í, hvussu leingi tolið røkkur hjá Tipstjenesten. Málið liggur nú hjá kappingarráðnum**

TIPS
*Heri á Røgvi*

– Landsstýrið spælir hasard við tipspengunum við at viðgera málið á henda hátt.

Hetta sigur Heðin Mortensen, formaður fyri ÍSF. Hann er sera ónøgdur við ta viðferð, ið málið hevur fingið.

Tað er nevniliga soleiðis, at hin 8. mars í ár skrivaði P/F Ítróttarvedding undir sáttmála við Tipstjenesten. Har varð gjørd ein fimm ára avtala við donsku veddingarmyndugleikarnar.



Heðin Mortensen sigur, at teir løgdu nógv arbeiði í samráðingarnar, og tað var eitt stórt stríð at fáa sáttmálan upp á pláss.

– Teir høvdu ikki víst áhuga fyri einum tílíkum sáttmála, men tað eydnaðist okkum at fáa tað upp á pláss, sigur Heðin Mortensen.

*– Vit hava longu merkt trýst úr Danmark, og eg eri ógvuliga bangin fyri, at mann spælir hasard við hesum peninginum, tí tolið er um at vera uppi í Danmark, sigur Heðin Mortensen*

Sambært reglunum, so skal landsstýrið góðkenna sáttmálan. Hetta hoyrir undir Høgna Hoydal í landsstýrinum, og hann skal góðkenna sáttmálan.

### Hasard

Heðin Mortensen sigur, at tað eru nú meiri enn tríggjar vikur síðani, at sáttmálin varð sendur út í landsstýrið, men hann er ikki vorðin góðkendur enn. Hetta er Heðin Mortensen og veddingarmyndugleikarnir alt annað enn fegnir um.

– Málið hevur ligið í landsstýrinum í alt ov langa tíð. Vit hava sent sáttmálan til góðkenningar, har vit hava biðið um eitt ja ella nei og einki annað, sigur Heðin Mortensen.

Formaðurin fyri ÍSF heldur ikki, at atburðurin hjá landsstýrinum í hesum málinum er heilt burturvið.

– Hesin sáttmálin tryggjar føroyskum ítrótti og føroyskari mentan. Umleið 6,5 mió kr. koma til Føroya til hesum sambandi, og hvar skulu pengarnir koma frá annars, sigur Heðin Mortensen.

Heðin Mortensen er av teirri fatan, at landsstýrið við hesum spælir hasard við peninginum hjá ítróttinum og mentani.

– Vit hava longu merkt trýst úr Danmark, og eg eri ógvuliga bangin fyri, at mann spælir hasard við hesum peninginum, tí tolið er um at vera uppi í Danmark, sigur Heðin Mortensen.

Landsstýrið hevur latið málið til Kappingarráðið til ummælis.

Heðin Mortensen sigur seg ikki skilja, hví málið er farið til Kappingarráðið, sum einki hevur havt við hetta málið at gera.

– Vit hava eina løgtingslóg á økinum, og tað er hana við ganga eftir. Hvat Kappingarráðið hevur við hetta at gera veit eg ikki, men hetta setir tipspengarnar í vanda, sigur Heðin Mortensen.

### Kannað

Terji Siðurðsson á Kappingarráðnum váttar fyri Sosialinum, at teir hava fingið málið til ummælis. Hann sigur, at tað er vanligt, at teir fáa mál til ummælist, men hetta er fyrstu ferð, at teir fáa ein tílíkan sáttmála.

Hann vil ikki gera viðmerkingar til møguligar hypotesur í hesum málinum. Hann sigur bara, at teir kannað málið, og hann veit ikki at siga, nær ið teir vera lidnir við kanna málið.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking úr landsstýrinum.